Sannførandi sigrar til oddaliðini og B36 kiksaði

HB hevur í tveimum teimum síðstu umførunum ráð til at missa tvey stig ímóti botnliðunum og kortini vinna meistaraskapin. KÍ og NSÍ avrikini hesa ferð boðaðu frá, at tað er gott í vantu, tá NSÍ í síðsta umfarinum skal til Klaksvíkar at stríðast um silvurmerkini

Gamaní vann EB/Streymur fyrr í summar 2–1 á HB á Mølini, og gamaní megnaði EB/Streymur sunnudagin 1–1 á heimavølli ímóti B36. Men við tí hugburðinum, sum HB hevur víst síðstu nógvu ferðirnar, er tað rættuliga óhugsandi, at teir skulu tapa á heimavølli

SAMANUM 16. UMFAR
Jóannes Hansen

Tað var eingin slingur í valsinum hjá HB, KÍ og NSÍ. Tey vunnu øll stórsigrar. HB og NSÍ vunnu ímóti botnliðunum, meðan KÍ sigurin var meiri merkisverdur. At vinna 5–1 ímóti GÍ bendir á, at KÍ er heilt væl fyri.

HB var sannførandi ímóti Skála, og tað er einki, sum bendir á, at teir fara at kiska ímóti EB/Streymi í Gundadali og TB á Tvøroyri. Gamaní vann EB/Streymur fyrr í summar 2–1 á HB á Mølini, og gamaní megnaði EB/Streymur sunnudagin 1–1 á heimavølli ímóti B36. Men við tí hugburðinum, sum HB hevur víst síðstu nógvu ferðirnar, er tað rættuliga óhugsandi, at teir skulu tapa á heimavølli. HB er so mikið væl fyri, at teir hava ráð at spæla annan dystin, sum teir eiga á, javnan. TB avrikið í Vági og ímóti NSÍ boðar avgjørt ikki frá, at tvørámenn kunnu gera nakað við HB.

Tað eru fimm stig frá KÍ og NSÍ og niður til GÍ og B36. Harvið tykist tað mest sum greitt, at KÍ fer at fáa seinna UEFA Cup plássið. Tað er longu greitt, at NSÍ fær hitt. Tað tryggjaðu teir sær í steypafinaluni ólavsøkudag.

B36 og GÍ hava framvegis teoretiskan møguleika at hótta KÍ, sum eigur NSÍ í síðsta umfarinum, men møguleikin er ikki serliga stórur. Hóast klaksvíkingar – sum øll hini liðini – altíð hava tað torført í Vági, so løgdu avrikini hjá VB á Toftum og KÍ á heimavølli sunnudagin upp til, at KÍ skal hava stig við sær til hús aftur av Vágseiði.

GÍ og B36 skulu dystast í Gøtu sunnudagin. Tá fara teir fyrst og fremst at spæla um plássið í Intertoto Cup. Fyri spælararnar er tað hugaligt at sleppa út í Europa at royna seg. Men fíggjarliga er tað eingin gloyibiti at vera við í Intertoto. Tað kostar at spæla íIntertoto Cup, og tær útreiðslurnar skulu takast av upphæddini, sum UEFA letur feløgunum.

UEFA letur eisini feløgunum, sum ikki sleppa upp í part í altjóða kappingunum, reiðan pening, og teir pengarnir fara beinleiðis niður í felags kassarnar. Feløgini, sum taka lut í UEFA Cup, fáa væl størri upphæddir, enn felagið, sum skal spæla í Intertoto Cup. Men GÍ og B36 fara neyvan at hava hetta fremst í huganum, tá tey sunnudagin fara á vøllin í Serpigerði.

Avgerðirnar

Tað er møguleiki fyri, at HB longu komandi sunnudag verður meistari. Treytin er, at teir fara at vinna á EB/Streymi, sum sunnudagin endaliga slapp undan øllum niðurflytingarfjasinum, og at KÍ og NSÍ í hvussu so er hálvkiksa. KÍ skal til Vágs, og NSÍ eigur torføra uppgávu á heimavølli. Teir skulu spæla ímóti B68.

Men kortini er tað mest sannlíkt, at KÍ og NSÍ í síðsta umfarinum fara at spæla um silvurmerkini. Um bæði liðini vinna komandi sunnudag, so verður treytin hjá NSÍ, at teir skulu vinna í Klaksvík. KÍ vann 1–0 í Runavík fyrr í summar.

Eftir nógva turbolensin heima á landi og ikki minst í Ekstrablaðnum í síðstu viku, tá B68 segði venjaranum úr starvi, fótaði B68 sær orduliga ímóti VB. Vágbingar tóktust vera sinniliga farnir í vetrarfrí, men tað var týðuligt, at B68 var betri fyri, enn teir hava verið leingi. Hetta er eisini tað, sum Øssur Hansen staðfestir aðra staðni í blaðnum í dag.

Beinleiðis niðurflytingin verður ivaleyst avgjørd sunnudagin. Tá bresta Skála og TB saman á Skála. Skálamenn vóru sunnudagin í Gundadali alt annað enn sannførandi. TB kom eitt sindur afturíaftur, eftir at NSÍ hevði gjørt tað, sum teir skuldu gera á Sevmýri.

Í síðsta umfarinum fer TB neyvan at fáa nakað frá HB, og um B68 vísir sama hugburð, sum teir gjørdu sunnudagin, so fer Skála heldur ikki at fáa nakað á Svangaskarði. Tí verður úrslitið á Skála sunnudagin eftir øllum at døma alt avgerandi fyri, um tað verður Skála ella TB, sum skal flyta beinleiðis niður. Skála er eitt stig framman fyri TB, og tískil er tað nóg mikið hjá teimum at greiða javnleik ímóti tvøråmonnum.

Tað er longu greitt, at AB, sum sunnudagin spældi 2–2 á heimavølli ímóti B36, fer at spæla í 2. deild komandi ár. B68, GÍ og Royn kappast um næstfremsta plássið í 3. deild, sum ber rætt við sær at spæla um eitt pláss í 2. deild.

Eins og í 2. deild so verður síðsta umfarið í 3. deild spælt komandi vikuskifti. Tá verður spædl soleiðis í 3. deild: Royn–TB, FS Vágar–B68, ÍF–B71 og GÍ–B36. Sambært skránni skal AB í Gundadali spæla ímóti HB. Men sambært heimasíðuni hjá HB, so gjørdu teir undan vikuskiftinum av at taka teirra lið úr kappingini. Tá høvdu teir tríggjar ferðir ikki verið førir fyri at manna lið, og ein av ferðunum var á heimavølli!

Annan leygardag verður síðsta umfarið í bestu deildini, og so verður bara stóra landsliðsferðin til Litava og Týskaland eftir á skránni í hesum kappingarárinum.

Helmingurin er framvegis í vanda

B71 ella ÍF skulu spæla í uppflytingarumfari. Tað sær heilt svart út hjá HB, og møguleiki er fyri at Sumba skal spæla fyri at sleppa undan niðurflyting

2. DEILD SAMANUM
Jóannes Hansen

Ongantíð áður er tað komið fyri, at ein kapping hevur verið so tøtt og spennandi, sum tann í næstbestu deildini er, nú tað bara restar eitt umfar. Beinleiðis uppflytingin er langt síðani avgjørd. FS Vágar flytir aftur í 1. deild, sum teir fluttu niður úr í fjør. Annars er sera spennandi.

B71 og ÍF skulu leygardagin stríðast fyri at vinna rættin til endaumfar um uppflyting. B36, KÍ og VB, sum ikki kunnu flyta upp, tí tey frammanundan eru umboðað í bestu deildini, eru við í stríðnum um heiðursmerkini. B36 er sloppið undan niðurflytingarhóttanini, og tað er KÍ eisini, tí Sumba og NSÍ, sum bæði eru niðanfyri teir, skulu spæla í síðsta umfarinum.

VB og Sumba kunnu enda í endaumfari um eitt pláss í 2. deild. NSÍ kann flyta beinleiðis niður. Tað skal vilja heilt illa til, um LÍF ikki er sloppið undan niðurflytingini, sjálvt um teir leygardagin á heimavølli taptu ímóti B71.

Tað stendur illa til hjá HB, sum er aftast við átjan stigum. HB skal leygardagin spæla síðsta dystin í Klaksvík. Eingin ivi er í, at KÍ fer at spenna seg út fyri at gera sítt til at vinna heiðursmerkini, og teir hava neyvan nakað ímóti, at teir næstbestu hjá HB flyta eitt stig niður.

Men tað kann eisini hugsast, at HB fer at gera ein orduligan vørr, sum teir gjørdu fyri góðari viku síðani í Sumba. Hvørki hjá KÍ ella HB er manningin hvørja ferð tann sama. Tá klaksvíkingar leygardagin vóru á veg norður aftur úr Vági við stórtapi í viðførinum, styttu teir sær um stundirnar við at telja, hvussu nógv fólk teir høvdu brúkt á næstbesta liðnum í ár, og teir komu til 41 spælarar! HB talið man neyvan vera langt við síðuna av.

Treytirnar hjá HB eru ikki lættar. Umframt at teir skulu vinna í Klaksvík, so skal Sumba vinna á NSÍ. Tann dysturin verður í Sumba.

At LÍF ikki er í so trongum skóm, sum stigatalvan kundi boðað frá, kemst av, at LÍF hevur vunnið báðar dystirnar ímóti HB – 3–1 íLeirvík og 2–0 í Gundadali. Sumba og HB hava vunnið hvør sín dyst í innanhýsis kappingini.

Við sigrinum á KÍ slapp VB sær burtur úr bólkinum av liðum, sum undan seinasta umfarinum eru hótt av niðurflytingini

Spennandi í toppinum

Tað eru B71 og ÍF, sum stríðast fyri at sleppa at spæla um eitt pláss í bestu deildini. Í B71 halda teir seg ikki vera tunaðar til 1. deildar fótbólt akkurát nú, og tað eru teir í Fuglafirði heldur ikki. Men tá møguleikin at spæla um pláss í bestu deildini dagast í havsbrúnni, so verður sjálvandi tikið av.

Á pappírinum hevur ÍF nógv torførari uppgávu enn B71. Fuglfirðingar fáa vitjan av FS Vágum, sum ivaleyst vil siga farvæl við 2. deild við maner. B71 verður eisini á heimavølli. Teir fáa vitjan av VB, sum hevur staðið seg ógvuliga væl síðani summarsteðgin. Vágbingar hava síðstu ferðirnar næstan sett næstbesta liðið framum 1. deildarliðið, og aftur leygardagin vunnu teir stórt.

Nú hevur VB lítlan møguleika at vinna bronsumerkini. Tað ljóðar, at ætlanin var at fáa styrk upp úr Danmark, um tað fór at standa á. Nú flytir VB ikki beinleiðis niður, men teir ætla framvegis at fáa styrk úr Danmark til Sandoyar ferðina.

B36, sum leingi var næstfremst, eigur heimadyst ímóti LÍF. Tí er rættuliga sannlíkt, at B36 í hvusu so er fer at vinna bronsumerkini.

Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways



Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2165,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 10/10 og 22/10 til 9/12 2002.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 30 dagar.

Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1479,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 9/12 2002.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Bílegging hjá Atlantic Airways
og á øllum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

team 85 • 358000

Støðleiðari til Shell í Klaksvík

Starvið:

Eginleikar:

Løn:

Umsóknir:

P/F Føroya Shell hevur deildir í Klaksvík, Suðuroy, Eysturoy og Tórhavn. Tað eru 10 Shell-støðir kring landið og uml. 100 fólk starvast hjá Shell í Føroyum. Shell eigur og rekur eisini tangabátin "MAGN". Árliga umsetur Shell fyri uml. 400-500 mio.kr. Virksemið hjá Shell í Føroyum hevur síðani 1973 verið í føroyskum partafelag, sum er ein partur av Royal Dutch Shell.

www.shell.fo

team 85 • 358000